# Ræðusøga um okkum sjálvi

**Hannis Martinson er hesaferð fangaður í eini ræðusøgu um okkum sjálvi, saman við einum høvunda, sum er á eini størri missión enn bara at skriva eina krimi**

UMMÆLI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*




*Nýggja krimisøgan hjá Jógvani Isaksen sendir illgrunasamar trægrir út í flestu krókar í føroyska nútíðar samfelagnum*

Tú kanst illa skjóta nýggju krimisøguni *Norðlýsi* hjá Jógvani Isaksen í skógvarnar, at her er enn ein føroysk skaldsøga, sum ikki torir at taka støði í føroysku nútíðini. Bókin kom út sama dag, sum søgan byrjar, og fáar síður inni í søguni staðfestir høvuðspersónurin Hannis Martinson, at tað eru 10 dagar til stóru veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn.

Aftur í veruleikanum kveitti eg yvir á ein álmanakka og konstateraði, at júst sum eg sat og las brotið, vóru tað átta dagar til stóru verðurlagsráðstevnuna. Næstan ónniligt bleiv tað, tá tað gekk upp fyri mær, at Hannis Martinson sat í sama húsi sum eg – í Miðlahúsinum í Vágsbotni –, meðan hann kjakast við blaðstjóran um veðurlagsráðstevnuna. Satt at siga byrjaði eg so smátt at eygleiða, um blaðstjórin, redaktørurin og starvsfólki á *Blaðnum* hjá Miðlahúsinum í bókini eisini vóru at kenna aftur.

Stóru tíðindini á *Blaðnum* hendan dagin í bókini eru tó alt annað enn gerandiskostur. Lesbiski kvinnuligi løgmaðurin, ella »løgmammman«, sum hon verður nevnd, er skotin, júst sum hon skuldi tendra jólatræið á Vaglinum, og alt landið er í djúpum skelki.

Í leiklutinum sum bæði journalistur á *Blaðnum* og sum detektivur fer Hannis Martinson i holt við at uppklára málið. Søgan er hendingarík, má sigast, tí sum frá líður liggur meginparturin av landsstýrinum eftirá, samstundis sum fleiri av teimum vísa eg at vera samkynd ella til bæði kynini. Leingi er illgruni um, at morðið á løgmann er politiskt grundað og hongur saman við illviljanum móti teimum samkyndu og 266b, sum løgmamman var heit talskvinna fyri. Skjótt verða eisini reiligiøs fanatisma, politisk maktgirnd og javnstøðumál flættað inn í myndina, og sum frá líður eru illgrunasamir trægrir spunnir út í flestu heraðshorn í føroyska samfelagnum.

Hetta gevur samstundis høvundanum míkar møguleikar at vísa seg tá hann er best við súrligu viðmerkingum hjá Hannis Martinson til alt frá føroyskum politikki, har ongin tímir at fáast við mentamál, til herligar eygleiðingar av føroyingum, sum draga sjálvljóðini í »Fagra blóma« so langt út, at sangurin mest sum ongan enda fær. Eisini fær lættkeyptur føroyskur journalistikkur og eitt humørgelt umhvørvi á Setrinum ikki so fá prik á vegnum.

Hóast sjálv krimisøgan er nakað tunn, samanborið við onkrar av hinum bókunum í røðini, er týðiligt, at høvundurin hesuferð hevur strammað bygnaðin í bókini upp. Burtur eru longu, frágreiðandi brotini av søguligari bakgrund, sum ofta hava gjørt undanfarnu krimibøkurnar hjá Jógvani Isaksen í so langdrignar. Einasta dømi av hesum slagi í *Norðlýsi* vísir á ábendingar um homoseksualitet í gomlu føroysku kvæðunum, og er hetta brotið samstundis sera áhugavert.

Málsliga flýtur søgan væl, og tess meir undranarverd eru frávikini. Til dømis havi eg ilt við at ímynda mær, at nakar tosar soleiðis í veruleikanum, sum tá einkjumaðurin eftir løgmammuna suffar: » Elin er deyð ... Samstundis noktar skilið at taka við tí, sum tað sjálvt sannkennir. Eg eri fullkomiliga í villareiði«

Bygnaðarliga er uttan iva neyðugt at tríva í aftur ymiskt í eini krimisøgu, so lesarin ikki missir tráðin. Hesuferð haldi eg tó høvundurin ger í so nógv av, tí tá Hannis Martinson fyri bæði triðju og fjórðu ferð fortelur enn einum persóni um sín nýggja illgruna, hava vit líkasum fatað tað.

Hannis Martinson fjepparar hava uttan iva glett seg til ella stúrt fyri, hvat fór at henda við garvaða detektivinum, sum higartil ikki kundi funnið uppá at lagt av at drekka og roykja og líka leggur í, hvat onnur, serliga konufólk, halda um hansara lívsstíl. Ikki minst eftir at høvundurin í fjør hótti við at lata unnustuna Durutu spæla ein størri leiklut, so Hannis Martinson bleiv meir sannførandi sum modernaður maður.

Møguliga skulu lesarar haldast í spenninginum eina løtu afturat, tí Duruta er næstan ikki til staðar í *Norðlýsi*. Afturfyri eru hinar kvinnulýsingarnar vorðnar mundandi meir fjøltáttaðar og ikki sørt javnstøðusinnaðar.

Skrappi detektivurin roynir sum frægast at sigla millum kvinnuskerini, men í løtum tykist hann geva skarvin yvir. Mitt í øllum viðgongur hann, at hann kundi hugsa sær »fastari rammur« við Durutu, og móti endanum á søguni veksur hann mín sann fleiri sentimetrar, tá hann til ein jólasjónleik hjá dóttrini kennir seg sum ein av »teimum røttu modernaðu pápunum, sum tóku sær líka nógv av børnunum, sum mammurnar« Hóast hann ikki ljóðar heilt sannførandi, er okkurt, sum bendir á, at høvundurin nú vil hava meir psykologiskt kjøt á Hannis Martinson.

Tematiskt liggur styrkin í bókini tó í nuanseraðu viðgerðini av hugburðinum til tey samkyndu í Føroyum og serliga lýsingini av, hvussu tey hvør sær royna at yvirliva. Hetta gevur hinvegin sjálvari spenningssøguni eina slagsíðu, sum ger, at bókin hevur lyndi til at koppa út úr krimisjangruni og við ispunnað morðinum inn í okkurt slag av søguligari fiktión, har neyva tíðarfestingin og dokumentariski karmurin freista okkum at spyrja »Hvat nú um ...?« Hvat nú, um vit høvdu ein lesbiskan løgmann í 2009 og eitt hevndarsjúkt, homofobiskt og religiøst forstýrað menniskja fekk eina byrsu í hondina ...

Hóast *Norðlýsi* ikki beinleiðis kann bólkast sum søgulig fiktión, ger høvundurin sær dælt av nøkrum at fremstu snildunum í sjangruni - at fanga ein tíðaranda og nakrar sosialar treytir, sum verða tambað til tað ítarsta í eini roynd at vísa okkum okkum sjálvi, tá ringast vil við.

Jógvan Isaksen, *Norðlýsi*,
Mentunargrunnur Studentafelagsins
2009